

*Krista og Fríðbjørn Poulsen úr Vestmanna hava verði fosturforeldur í sjey ár*

# » Vit eru líka góð við tey sum

**–Tú skal verða ómetaliga sterkur sálarliga og hava eitt sterkt hjúnarlag. Tað siga Krista og Fríðbjørn Poulsen úr Vestmanna, sum hava verið fosturforeldur í sjey ár.**

*Inna Tørnroos*
*inna@sosialurin.fo*

Higartil hava tey havt tíggju børn búgvandi, og beint nú býr ein lítil eitt ára gamal drongur hjá teimum.

– Við byrjaðu við at hava børn til umlætting nøkur vikuskiftið um mánaðin, men nú eru vit farin yvir til at hava hendan drongin búgvandi heima hjá okkum. Hann hevur verið hjá okkum í 10 mánaðar higartil.

Krista lesur til pedagog og Fríðbjørn arbeiður hjá SEV. Tey hava tvey biologisk børn frammanundan, sum nú eru ávíkavist 23 og 17 ár.

Eitt av teimum fyrstu børnunum, vit høvdu búgvandi, var eitt hálvt ár yngri enn sonur okkara. Tað riggaði fínt, men nú hava vit valt at ikki hava so javngomul børn eftirsum vit ikki vilja, at børnini hjá okkum skulu føla eina ábyrgd av fosturbørnunum.

– Tað er jú vit, sum skulu uppala barnið og ikki okkara børn.

Orsøkin til at Krista og Fríðbjørn byrjaðu við fosturbørnum 1998 var, at Krista hevði búð niðri í Danmark og komið í kontakt við eina familju, sum hevði fosturbørn.

– Vit hava eisini altíð verið áhugaði fyri teimum, sum ikki hava tað so gott, sigur Fríðbjørn, og so kennist tað fínt at gera mun.

Fólk rundan um tey spyrja ofta, hvussu tey orka, men tað tykist ikki at verða nakar trupulleiki hjá teimum báðum. Hóast tað, so viðganga bæði, at tað kann verða øgiliga hart at lata eitt barn frá sær sum man er blivin góður við.

– Tað er hent, at vit ikki eru samd við systeminum um, nær eitt barn skal aftur til foreldrini, og tá er tað sera hart, sigur Fríðbjørn.

Bæði vóna, at nýggja barnaverndarlógin skal verja barnið betur enn gamla lógin. Tey meina, at ov stórur dentur hevur verið lagdur á rættin hjá foreldrunum og ov lítið hugsað um barnið.

### Biologisku foreldrini

– Sum fosturforeldur er tað sera týdningarmikið at hava góða kontakt við tey biologisku foreldrini. Tað hevur virkað sera væl hjá okkum, og vit hava kontakt við níggju av teimum tíggju børnunum, sum hava búð hjá okkum.

– Ein dagin møtti eg einari mammu, sum vit hava haft børnini hjá, í SMS. Hon fór og keypti okkum eina flotta samanplanting, fortelur Krista.

Hvussu leingi tey skulu fortseta sum fosturforeldur, vilja tey ikki fara inn á, Krista er nú 46 ár og Fríðbjørn er 49 ár.